# Sheanne hjá Bjarta liggur nú í Klaksvík

**Hóast ídnaðarskipið, Sheanne hjá Bjarta Mohr, reiðara, nú liggur í Klaksvík, ber ikki til at fáa endaliga greiði á, hvat verður av skipinum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í løtuni er ikki lætt at fáa greiði á, hvussu verður við ídnaðarskipinum, Sheanne, sum Bjarti Mohr eigur.

Tá ið skipið kom á Fuglafjørð í farnu viku, vóru menn hjá JFK í Klaksvík umborð, og tosað varð um, at skipið helst endar í Klaksvík.

### Møguligt samstarv

Bjarti Mohr segði í samrøðu við Sosialin fríggjadagin, at hann og JFK tosaðu um samstarv.

– Men enn er ov tíðliga at siga, hvat fer at spyrjast burtur úr hesum.

Hann segði, at øktu oljuútreiðslurnar gera, at neyðugt er at spara sigling og olju. Tí verða ymiskir møguleikar kannaðir, eitt nú møguleikarnir við partroli, sum ikki er ókent eftir pelagiskum fiski.

Eisini aðrir møguleikar um samstarv verða kannaðir, segði Bjarti Mohr, sum legði aftrat, at skipið er ikki selt til Klaksvíkar.

Selt ella ikki. Tað vita vit ikki, men í morgun liggur Sheanne so í Klaksvík – við Kósavirkinum, sum JFK eigur, í baksýni.

### Einki endaligt

Hóast umhugsaða samstarvið er komið so langt, at skipið nú liggur í Klaksvík, ber framvegis ikki til at fáa greiði á, hvat er í umbúna hjá Bjarta og JFK.

Á heimasíðuni hjá Norðlýsinum herfyri stóð at lesa, at felagið hjá Atlantic Navigator roynir at keypa skipini, Sheanne, Bettinu og June D, tí skipini hava loyvi at veiða svartkjaft.

Í greinini verður víst á, at tað er Atlantic Navigator, sum vil hava rúmari ræsur.

Hanus Hansen, stjóri í JFK-Troli, vísir á, at Sheanne nú liggur í Klaksvík, men enn er einki endaligt, og tí kann hann ikki siga, hvat verður av teimum ætlanum, sum felagið arbeiðir við.

Í løtuni ynskir hann heldur ikki at siga ítøkiliga, hvørjar ætlanir, talan er um.

– Vit eru nýliga farnir at tosa um tað, sum er í umbúna, men fyrr enn endaligar avgerðir eru tiknar, tori eg ikki at siga meira um hetta, sigur Hanus Hansen.




*Ídnaðarskipið, Sheanne hjá Bjarta Mohr, liggur nú í Klaksvík. Hvørki eigarin ella møguligi keyparin vilja siga nakað ítøkiligt, fyrr enn endalig avgerð er tikin* *Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ymiskir møguleikar

Bjarti Mohr, reiðari, segði við Sosialin fríggjadagin, at hann tá ikki dugdi at siga, um talan verður um sølu – ella annað samstarv millum feløgini.

– Vit hava tosað um ymiskar møguleikar, men eru ikki komnir fram til nakað endaligt, segði hann.

Tá ið teir, sum standa málinum nærmast, Bjarti Mohr og Hanus Hansen, ikki vilja siga meira, stendur spurningurin í løtuni opin, hvat verður av Sheanne – og hinum báðum ídnaðarskipunum, Bettinu og June D.

---

# Veksandi marknaður fyri surimi í Evropu

**Tað hevur gingið væl hjá Atlantic Navigator, síðan skipið kom til landið og fór royndartúrin um hálvan desember í fjør.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir fyrstu mánaðirnir av árinum er vertíð, og sigast má, at Atlantic Navigator hevur fingið væl burtur úr hesi tíðini.

Eftir lutfalsliga stuttar túrar, er skipið komið aftur til lands við fullari last.

Tað hevur gingið væl at fiska, og tað hevur gingið væl at framleiða.

Í síðstu viku var skipið soleiðis aftur í Ánunum við fullari last, 1750 tonsum tilsamans. Sløk 1300 tons var surimi og restin mjøl.

Skipið legði veiðina upp og fór beint avstað aftur. Skipari á seinasta túri var Lion Petersen, og hann er aftur skipari hendan túrin, sum júst er byrjaður.

Hin skiparin, Brandur Nólsoy, hevur frí.

### Vøkstur í Evropu

Hanus Hansen, reiðari, letur væl at gongdini hjá Atlantic Navigator higartil.

– Jú, vit kunnu ikki annað enn vera nøgdir. Skipið ger lutfalsliga stuttar túrar og kemur heimaftur fult undir lúkurnar.

Hann sigur, at marknaðurin fyri surimi er rímiliga góður í løtuni.

– Seinastu 12 mánaðirnar eru prísirnir gingnir spakuliga uppeftir. Hetta er ein bati í mun til seinastu tvey árini annars.

Reiðarin vísir á, at umleið helmingurin av surimimarknaðinum er í Japan og hin helmingurin í Evropu.

– Japanski marknaðurin veksur ikki í løtuni, men tað ger tann evropeiski í staðin. Tað er serliga í Fraklandi og Spaniu, at tey keypa surimi, sum er virkað úr svartkjafti. Men vit hava eisini onnur keyparalond í Evropu, eitt nú baltisku londini, sigur Hanus Hansen.




*– Japanski marknaðurin veksur ikki í løtuni, men tað ger tann evropeiski í staðin, sigur Hanus Hansen, reiðari* *Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Klakkur niður at selja

**Línuskipið, Klakkur, er á veg niður til Skotlands at selja. Teir fara antin til Scrabster ella Aberdeen við veiðini.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hendan túrin hava teir roynt á Munkagrunninum, og sum skilst, hevur fiski-skapurin verið hampiliga góður.

Klakkur hevur ligið millum 10.000 og 12.000 pund á setuna, og tað er rímiliga góður fiskiskapur.

Ein stórur partur av veiðini er hýsa, og nú útlit eru fyri hampiliga góðum hýsuprísi í Skotlandi, gjørdu teir av at fara niður við lastini. Hildið verður, at Klakkur hevði eini 100.000 pund inni, tá ið teir stevnu niður á skotska marknaðin.